# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Aron Strømsten, Sandavági**, andaðist sunnudagin á Ríkissjúkrahúsinum, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14 úr Sandavágs kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

**Kirstin Baldwin**, fødd Anthoniussen, vanliga nevnd Kirstin hjá Thalu, andaðist 27. apríl, 70 ára gomul.

**Maria Hansen, Klaksvík**, andaðist á Sambýlinum á Heygnum í nátt, 89 ára gomul.

**Jenny Miðberg, Vestmanna**, andaðist sunnukvøldið, 89 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinummikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin kl. 14.

**Jana Olivia Jacobsen**, ættað úr Fuglafirði, búsitandi í Havn, andaðist mánadagin, 91 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin kl. 13.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Maria Hansen**
Klaksvík

andaðist í Sambýlinum á Heygnum, 89 ára gomul.
Kistan fer frá Sambýlinum á Heygnum hóskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Marianna og Krissmund**

Tey, ið ynskja at minnast Mariu, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta, konta í peningastovnunum.

## 35 ára føðingardagur



Tann 3. mai verður Solina Jacobsen 35 ár. Dagurin verður hildin 2. mai kl. 19.00 í Samljóð í Skopun við einum drekkamunni.

**80 ára føðingardagur**
Í dag, 29. apríl - fyllir Sigga Dam, Tórshavn - 80 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

**85 ára føðingardagur**
Í dag, 29. apríl, verður Petra Holm, Hvalba, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
1. mai verður Mortan Mortensen, Hvalba, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

# Jari Lykke formaður

Koyrilærarafelagið hevði eykaaðalfund fríggjadagin 24. apríl og var nýggj nevnd vald.

Niels Petur Olsen ynskti ikki at halda fram sum formaður, so Jari Lykke varð valdur til nýggjan formann. Fyri Stanley Olsen og John Christiansen vóru Andrea Isaksen og Benny Ejdesgaard vald í nevndina, sum ein av komandi døgunum fer at skipa seg.

Á fundinum var m.a. ynski frammi um at fáa eitt búmerkið, sum limir í koyrilærarafelagnum kunnu brúka á skúlavognunum og í lýsingum, um teir ynskja tað.

Jari Lykke sigur, at onnur ynski vóru frammi, m.a. at limir í felagnum ikki skulu samstarva við limir sum ikki eru limir í felagnum, skeið í fyrstuhjálp, eisini var ein hálkubreyt uppi at venda á fundinum. Hetta er nakað av tí, sum komandi nevndin fer at hyggja nærri eftir sigur Jari Lykke.



*Jari Lykke er nýggjur formaður í Koyrilærarafelagnum*

Fyri 25 árum síðan:

# Pinocchio í Vakhúsi



*Kári Jacobsen sum Pinocchio og Anni Arge Jacobsen sum álvagentan*

Í Sosialinum leygardagin 28. apríl 1984 stendur at í dag kl. 15.00 og kl. 17.00 framførir Havnar Sjónleikarafelag leikin Pinocchio í Vakhúsi í Sandavági. Bussur koyrir úr Sørvági í sambandi við sýningarnar. Talan er um ein barnaleik fyri børn undir 80 ár stendur í blaðnum.

Kári Jacobsen hevði leiklutin sum Pinocchio og Anni Arge Jacobsen hevði leiklutin sum álvagentan.

# Realskúlanæmingar í 1964

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin fyri 45 árum síðan, í 1964. Realskúlanæmingar eru til fráfaringarnátturða inni hjá Frøken Cohr, lærara, sum búði í húsunum við síðuna av realskúlabygninginum.

Næmingarnir eru f.v.: Anfríði Dam Jacobsen, Krisjan Dahl, Olaf Johansen og Ása Sørensen (á Mýrini)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 486).



*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*

**Dagurin**
**29. apríl. Pætur blóðvitnismaður,** deyður í 1252. Dagurin hevur navn eftir einum dominikanamunki, sum varð myrdur av fíggindum í Milano

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*